# Umhvørvisgóðkenning

sambært kapittul 5 í Ll. nr. 134 frá 1988 um umhvørvisvernd

<table>
<tr><td colspan="2">Navn á virki við góðkenning:<br>Jarnmóttøka hjá Sp/F Vígdis</td></tr>
<tr><td colspan="2">Bústaður hjá virki:<br>Skoragøta 1, Rituvík</td></tr>
<tr><td colspan="2">Galdandi fyri virksemi:<br>At savna, viðgera og útflyta jarn- og metal-skrambul til endurvinning</td></tr>
<tr><td>Matr. nr.:<br>47v á Nesi</td><td>V-tal:<br>503649</td></tr>
<tr><td>Mál nr.:<br>12/00352-22</td><td>Galdandi frá:<br>21-05-2014</td></tr>
<tr><td colspan="2">Navn á eigara:<br>Poul N. Danielsen</td></tr>
<tr><td colspan="2">Bústaður hjá eigara:<br>Oman Sandheyggj 3, 625 Glyvrar</td></tr>
</table>

Argir, hin 14-05-2014

Suni Petersen, deildarleiðari

Ingvard Fjallstein, umhvørvisviðgeri

# Innihaldsyvirlit

1 Umsóknin ..... 3
2 Góðkenning og heimild ..... 3
3 Viðgerð ..... 3
3.1 Málsviðgerð ..... 3
3.2 Lýsing av virkseminum ..... 4
3.3 Lýsing av umhvørvisviðurskiftum ..... 4
4 Góðkenningartreytir ..... 4
4.1 Almennar treytir ..... 4
4.2 Innrætting og rakstur ..... 5
4.3 Spillivatn og regnvatn ..... 5
4.4 Útlát til luft ..... 6
4.5 Óljóð, ristingar, geislingar og ljós ..... 6
4.6 Goymslur ..... 7
4.7 Burturkast ..... 7
4.8 Óhapp ..... 7
4.9 Sýnistøkur og kanningar ..... 7
4.10 Innaneftirlit og umhvørvisstýrisskipan ..... 8
4.11 Rakstarskrásetingar og umhvørvisfrágreiðing ..... 8
5 Kæruvegleiðing ..... 9

# 1 Umsóknin

Tann 20. september 2012 fekk Umhvørvisstovan umsókn frá Sp/F Vígdis um umhvørvisgóðkenning til uppsamling og skiljing av jarn- og metalskrambli . Av tí at umsóknin ikki var nóg fullfíggjað, hevur Umhvørvisstovan biðið um eyka upplýsingar.

# 2 Góðkenning og heimild

Henda umhvørvisgóðkenning til Sp/F Vígdis, á matr. nr. 47v á Nesi, er givin við heimild í § 29 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, og § 1, nr. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna, við seinni broytingum.

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi og at fyribyrgja og avmarka ampar, sum kunnu standast av virkseminum.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóggávu.

# 3 Viðgerð

Í viðgerðini av umsóknini og til áseting av treytum er m. a. hetta tilfar nýtt:

- Umsókn dagfest 20-09-2012
- Ískoytistilfar til umsóknina og fundur við eigara
- Vitjan á staðnum

## 3.1 Málsviðgerð

Í málsviðgerðini er serligur dentur lagdur á:

- at dálkandi evni ikki verða leidd út í umhvørvið
- at vandin fyri óhappum, sum kunnu hava dálking við sær, verður minkaður mest møguligt
- at virki hevur mannagongdir at fyribyrgja dálkandi óhappum
- at útgerð at handfara dálkandi óhapp er tøk
- at virkið avmarkar óljóð mest møguligt
- at besta tøka tøknin, sambært BAT[1]-hugtakinum, verður nýtt í mest møguligan mun

Uppskot til umhvørvisgóðkenning var sent Sp/F Vígdis og Runavíkar kommunu til hoyringar. Hvørki Sp/F Vígdis ella Runavíkar kommuna høvdu viðmerkingar til uppskotið.

---

[1] **Best Available Techniques (BAT)**. Hugtakið *besta tøka tøknin* er at skilja sum mest framkomnu framleiðsluhættir, tilgongdir og rakstrarmannagongdir, sum til einhvørja tíð eru mest munadyggar fyri at fyribyrgja og avmarka dálking frá ávísari vinnugrein ella ávísum virksemi. Hugtakið fevnir ikki bert um tøkniligar loysnir, men eisini um t.d. nútímans framleiðsluhættir, nýtslu av minni dálkandi rávørum, avmarking av burturkasti, endurnýtslu og endurvinning, umframt nýtslu av rávørum og orku. Ein treyt fyri at koma undir hugtakið er eisini, at tøknin er roynd og tøk á marknaðinum fyri rímiligan kostnað.

### 3.2 Lýsing av virkseminum

Virksemið fer fram á matr. nr. 47v á Nesi, sum er við Skoraveg á Ritvíkshálsi í Runavíkar kommunu. Sp/F Vígdis eigur økið.

Virksemið snýr seg um at savna og skilja tilfar av jarni og metali, sum síðani verður útflutt í bingjum. Áðrenn metalini verða koyrd upp í bingjur, verður alt óviðkomandi tilfar, sum plast og timbur, tikið av, men roynt verður at hava so lítið av handfaring sum gjørligt.

Kranabilur og hondútgerð verður brúkt til at gera arbeiðið. Timbur, plast og tílíkt verður sent til IRF.

Sp/F Vígdis útflytir 500-700 tons av jarni og metali um árið, men felagið metir, at nøgdirnar eru minkandi.

Økið verður eisini brúkt sum bingjugoymsla og umframt at ætlanin er at hava eina høll á økinum.

### 3.3 Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

Sambært byggisamtyktini fyri Runavíkar kommunu er Skoravegur í  D31 øki, sum er ætlað til ídnaðar og vinnuvirki, framleiðslu og goymsluvirki og kap. 5 virki.

Virkið hevur onga beinleiðis framleiðslu, men savnar tilfar, sum skal skiljast, pakkast í bingjur og útflytast til endurnýtslu. Tilfarið verður flutt við kranabili og møguliga tikið sundur við handamboðum.

Men sum tað framgongur av umsóknini og vitjanini á staðnum, savnar Sp/F Vígdis eisini maskinur, trukkar, akkumulatorar o.a. Hesi kunnu innihalda oljur, sýrur og møguliga onnur dálkandi evni.

Treyt verður sett um, at virksemið fer fram á føstum og tøttum arbeiðsøki.

Treyt verður sett um, at Sp/F Vígdis hevur eina hóskandi reinsiskipan, áðrenn regn- og spulivatn verður leitt í kommunalu spillvatnsskipanina.

## 4 Góðkenningartreytir

### 4.1 Almennar treytir

4.1.1 Hendan umhvørvisgóðkenning, við møguligum broytingum og dagføringum, skal altíð finnast á virkinum, og skulu øll viðkomandi starvsfólk kenna innihaldið og verða kunnað um ta lóggávu, sum góðkenningin er grundað á.

4.1.2 Virkið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið nertir við dálkingarviðurskifti virkisins, fyrr enn nýggj góðkenning er givin til hesa víðkan ella broyting.

4.1.3 Eigaraskifti, navnabroyting ella avtøka skal fráboðast Umhvørvisstovuni. Um virksemið heldur uppat, skal Sp/F Vígdis gera eina ætlan um, hvussu økið verður riggað av og skipað í góðari tíð frammanundan. Ætlanin skal góðkennast av Umhvørvisstovuni.

4.1.4 Allar sýnistøkur og kanningar v.m. sum verða kravdar í umhvørvisgóðkenningini skulu gerast av starvsstovu, sum kann góðkennast av Umhvørvisstovuni.

4.1.5 Allar sýnistøkur, kanningar og metingar av úrslitum verða goldnar av Sp/F Vígdis.

4.1.6 Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin, kunnu ikki gevast onnur boð ella forboð enn ásett í hesi góðkenning, uttan so at:

- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingarskaðaárin.
- dálkingin elvir til umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin.
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.
- ampar verða av virkseminum, sum ikki kundu síggjast tá góðkenningin varð givin.

4.1.7 Tá ið meira enn 5 ár eru gingin, eftir at góðkenningin er lýst, kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í góðkenningini, tá ið tað er umhvørvisliga grundað ella um minni dálkandi framleiðsluhættir ella betri reinsingarhættir eru komnir fram.

## 4.2 Innrætting og rakstur

4.2.1 Góðkenningin er grundað á at Sp/F Vígdis avskipar upp til 700 tons av metali um árið.

4.2.2 Virksemið skal einans vera á matr. nr. 47v á Nesi, sum er við Skoraveg á Ritvíkshálsi í Runavíkar kommunu.

4.2.3 Virksemið skal skipast soleiðis, at økið og umhvørvið annars ikki verður dálkað av hesum.

4.2.4 Fast og tætt tilfar, so sum asfalt ella betong, skal leggjast á alt økið í seinasta lagi 31-12-2014.

4.2.5 Økið skal girðast inni við betonggarði og tveimum metra høgum hegni og skal kunna læsast fyri óviðkomandi í seinasta lagi 31-12-2014.

4.2.6 Økið skal vera væl skipað og altíð hava nóg mikið av hóskandi bingjum og íløtum til tilfar og burturkast, sum verður savnað á økinum.

4.2.7 Økið verður ruddað og reinsað regluliga og í minsta lagi einaferð um vikuna, og rusk og smátilfar savnað í tætta bingju.

4.2.8 Íløt til brúktar akkumulatorar, olju og serliga dálkandi burturkast skulu savnast á serstakt økið, sum er skipað soleiðis, at møguligt spill verður hildið aftur.

4.2.9 Ein hóskandi nøgd av oljusúgvandi og kemikaliusúgvandi tilfari skal altíð verða á økinum.

4.2.10 Verður høllin brúkt til viðgerð ella goymslu av innsavnaðum tilfari, skal hon hava tætt gólv, t.d. betong. Hevur høllin frárensl, skal tað leiðast ígjøgnum reinsiskipanina á økinum.

4.2.11 Alt tilfar skal skiljast soleiðis, at so nógv sum møguligt kann endurnýtast ella endurvinnast.

4.2.12 Miðast skal eftir at nýta bestu tøku tøknina (BAT)

## 4.3 Spillivatn og regnvatn

4.3.1 Einki frárenningarvatn má bera brá av olju ella aðrari dálking.

4.3.2 Fyri at avmarka útleiðingina mest møguligt, skal møguligt spill av olju ella kemiskum evnum takast upp og burturbeinast, áðrenn økið verður spulað.

4.3.3 Spillivatnið frá øllum økinum skal leiðast gjøgnum reinsiskipan, t.d. sandfang og oljuskiljara, sum er góðkendur eftir norðurlendskum góðkennngartreytum, í seinasta lagi 31-12-2014.

4.3.4 Oljuskiljarin skal hava ávaringarskipan og sjálvvirkandi læsing, tá hann er hóskandi fullur.

4.3.5 Sýnistøkubrunnur, ið ger tað møguligt at taka sýni av reinsaða spillivatninum, skal vera eftir oljuskiljara.

4.3.6 Reinsiskipanin skal tømast eftir tørvi, tó í minsta lagi einaferð um ári, soleiðis at hon altíð virkar til fulnar.

**4.3.7** Alt spillivatn skal leiðast í kommunalu spillivatnsleiðingina**.**

## 4.4 Útlát til luft

4.4.1 Virksemið má ikki hava ampar av royki, lukti ella dusti við sær uttan fyri øki virkisins.

4.4.2 Allar útleiðingar til luft skulu førast uppeftir.

4.4.3 Um ampar verða av royki, lukti, dusti ella øðrum, skulu avmarkandi tiltøk setast í verk.

## 4.5 Óljóð, ristingar, geislingar og ljós

4.5.1 Alt virksemi skal fara fram soleiðis, at tað í minst møguligan mun hevur við sær ampar av óljóði, ristingum, ljósi ella geislingum uttan fyri øki virkisins.

4.5.2 Raksturin má ikki hava við sær, at óljóðsstøðið, ásett sum ekvivalenta, korrigeraða óljóðsstøðið í dB(A), fer upp um niðanfyri nevndu mørk máld við næsta grannamark í viðkomandi økjum sambært kommunalu byggisamtyktini (Talva 1).

Talva 1: Markvirði fyri óljóð - dB(A)

| Dagur | Tíðarskeið | Øki 1 | Øki 2 | Øki 3 | Øki 4 |
|---|---|---|---|---|---|
| Mánadag – fríggjadag | 07.00-18.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Mánadag – fríggjadag | 18.00-22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Leygardag | 07.00-14.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Leygardag | 14.00-22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Halgidagar | 07.00-22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allar dagar | 22.00-07.00 | 70 | 60 | 40 | 35 |

Øki 1: Vinnuøki, har larmandi virksemi kann fara fram
Øki 2: Vinnuøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram
Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarøki
Øki 4: Bústaðarøki

4.5.3 Í tíðarskeiðinum kl. 22-07 kann óljóð (løtuvirðir) í bústaðarøkjum (øki 3 og 4) í mesta lagi fara 15 dB(A) upp um omanfyrinevndu markvirði.

## 4.6 Goymslur

4.6.1 Goymslur við olju og kemiskum evnum skulu vera vardar ímóti regni og vindi.

4.6.2 Lekar skulu kunna haldast aftur í savningarbrunni, sum rúmar innihaldið í tí størsta ílatinum.

4.6.3 Goymslan skal kunna læsast fyri óviðkomandi.

4.6.4 Flótandi og fast vandamikið burturkast skal goymast í íløtum, sum hóska til endamálið, og sum eru merkt sambært galdandi trygdar- og flutningstreytum.

## 4.7 Burturkast

4.7.1 Alt burturkast skal handfarast í samsvari við galdandi reglur um burturkast[2] og skal latast til góðkendan móttakara.

4.7.2 Burturkast skal goymast í íløtum ella bingjum, sum hóskar til endamálið, og skal standa soleiðis, at tað ikki elvir til dálking ella er til ampa.

4.7.3 Burturkast skal avskipast reglulig soleiðis at goymslurnar ikki gerast ov stórar.

4.7.4 Brúktir akkumulatorar og serliga dálkandi burturkast, sum verða útflutt beinleiðis, eru at rokna sum vandamikið góðs og skulu útflytast sambært millumtjóða góðkendum flutningsreglum.

## 4.8 Óhapp

4.8.1 Har vandi er fyri spilli av kemiskum evnum, skal arbeiðast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.

4.8.2 Virkið skal hava mannagongdir til at fyribyrgja dálkingaróhappum og til upprudding eftir møgulig óhapp.

4.8.3 Virkið skal hava útgerð til upprudding eftir møgulig dálkingaróhapp.

4.8.4 Henda dálkingaróhapp, skulu beinanvegin setast í verk tiltøk til avmarking og upprudding.

4.8.5 Størri útlát ella dálking skal beinanvegin fráboðast Umhvørvisstovuni. Eisini skal ein frágreiðing um orsøk og møgulig tiltøk til upprudding v.m. sendast Umhvørvisstovuni[3].

## 4.9 Sýnistøkur og kanningar

4.9.1 Umhvørvisstovan kann krevja, at kanningar vera gjørdar av spillvatninum frá økinum.

4.9.2 Um spillivatnssýni verða tikin úr sýnistøkubrunni eftir oljuútskiljara, skulu tey í minsta lagi lúka markvirðini, sum eru ásett í Talvu 2.

---

[2] Kunngerð nr. 147 frá 19-10-1995, um burturkast, broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007.

[3] Dálkingaróhapp skulu eisini fráboðast til Løgregluna (dálking á landi) ella til Sjóbjargingarstøðina, MRCC-Tórshavn (dálking á sjónum).

Talva 2. Marvirðir fyri spillvatn

| Parametur | Markvirðir |
|---|---:|
| pH | 6 – 9 |
| Mineralolja | 10 mg/l |
| Blýggj (Pb) | 0,5 mg/l |
| Cadmium (Cd) | 0,1 mg/l |
| Kyksilvur (Hg) | 0,003 mg/l |

## 4.10 Innaneftirlit og umhvørvisstýrisskipan

4.10.1 Kanningar, sum eru ásettar í hesi góðkenning, kunnu verða broyttar til onnur sýnissløg og fleiri parametrar eftir nærri áseting frá Umhvørvisstovuni.

4.10.2 Umhvørvisstovan kann krevja, at virkið skjalprógvar, at treytirnar um óljóð, ristingar og ljós, um útleiðing til luft og spillivatn, verða hildnar.

4.10.3 Umhvørvisstovan kann krevja, at virkið ger serligar kanningar fyri at meta um møgulig dálkingarárin frá virkinum.

4.10.4 Allar sýnistøkur og kanningar skulu gerast av starvsstovu, sum kann góðkennast av Umhvørvisstovuni.

4.10.5 Umhvørvisstovan kann krevja, at Sp/F Vígdis skal hava hóskandi umhvørvisstýriskipan viðvíkjandi dálkingaravmarkandi tiltøkum, mannagongdum, eftirliti, skráseting, handfaring av burturkasti o.ø.

## 4.11 Rakstarskrásetingar og umhvørvisfrágreiðing

4.11.1 Virkið skal skráseta hesar upplýsingar:

- Kanningarúrslit av spillivatnskanningum
- Innsavnað nøgd, býtt upp á høvuðsbólkar, sum m3, tons ella kg
- Avskipaðar nøgdir og móttakari av tilfari, býtt upp á høvuðsbólkar, tons ella kg
- Avskipað nøgd av burturkasti og móttakari, býtt upp á høvuðsbólkar, sum m3, tons ella kg
- Reinsing og viðlíkahald av reinsiskipan, dagfesting og nøgdir
- Rakstrartrupulleikar/óhapp
- Onnur viðurskifti av umhvørvisligum týdningi

4.11.2 Rakstrarskrásetingarnar skulu til eina og hvørja tíð kunna síggjast av eftirlitsmyndugleikanum og skulu goymast í 5 ár.

4.11.3 Árlig umhvørvisfrágreiðing við uppgerð av:

- rakstrarskrásetingum
- frágreiðing um umhvørvisviðurskifti,
- tulking av kanningarúrslitum,
- óhapp,
- gjørd og ætlað umhvørvistiltøk v.m.

skal sendast Umhvørvisstovuni í seinasta lagi 1. mars í avloysandi árinum.

# 5 Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd við seinni broytingum, kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til landsstýrismannin við umhvørvismálum við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.